FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 3. mai 2021
J. nr.: 21/00131
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-122/2020 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um havnarlagið í Skúgvi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

- Hevur landsstýrismaður ætlanir um at bøta um havnarlagið í Skúgvi í summar?

Svar
Landsstýrismaðurin arbeiðir fyri at ferðasambandi er gott um alt landið.

Fleiri lendingar og atløgubryggjur á útoyggjum, sum Strandferðslan brúkar, eru ikki í nóg góðum standi. Havnirnar eru kommunalar, men kann tað verða trupult hjá smæstu kommununum at fíggja neyðugar umvælingar.

Landsverk hevur gjørt fyribils kanningar av havnalagnum í Skúgvi, og heldur fram við at fyrireika verkætlanina. Roynt verður at finna pening, so arbeiðið kann gerast í summar.

Tinganes, 3. mai 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum